# Kunning um privata borgan og triðjamansveð

**Kunning um borgan og triðjamansveð**
Faldarin snýr seg um privata borgan og privata triðjamansveðseting, ið tú veitir yvir fyri Betri Banka sum lánsgevara.

Hesin faldari vendir sær bert til privatpersónar, ið borga ella veita trygd sum veð t. d. í einum bili ella fastogn fyri lán hjá einum øðrum í Betri Banka. Er eitt vinnuligt samband millum lántakara og borgsmann, er borganin ella veðsetingin ikki fevnd av hesum reglum. Faldarin er tí ikki galdandi, um t. d. ein kapitaleigari í einum smápartafelag borgar ella veðsetir fyri lán hjá smápartafelagnum.

**Hvat er borgan ?**
At borga merkir, at tú yvir fyri Betri Banka bindur teg til at gjalda skuld hjá øðrum lántakara/persóni, um hesin ikki vil ella kann gjalda.

Ein borgan yvir fyri Betri Banka er vanliga ein sokallað sjálvskuldaraborgan. Tað merkir, at Betri Banki kann fara beinleiðis til tín sum borgsmann og krevja, at tú rindar, tá lántakarin er givin við at gjalda lánið aftur.

**Hvat er triðjamansveð ?**
At veita triðjamansveð merkir, at tú veitir Betri Banka veð í einum luti, tú eigur, t. d. tínum bili ella tínum húsum til trygd fyri skuld hjá einum øðrum persóni / lántakara. Um lántakari ikki rindar, vil Betri Banki sum lánsgevari biðja teg um at gjalda skuldina. Um tú ikki megnar tað, fer tann veðsetti luturin at verða seldur og søluágóðin brúktur at rinda skuldina hjá lántakaranum.

**Hvat skalt tú serstakliga gáa um ?**
Um tú verður biðin um at borga ella veðseta fyri lántakara, eru tað serliga tvey viðurskifti, sum tú skalt gáa um:

1. Tú eigur ikki at borga ella veðseta, um tú ikki kanst vera ta upphæddina, tú verður biðin um at borga ella veðseta fyri, fyriuttan. Spyr tí altíð teg sjálva/n, um tú ert til reiðar at "geva" lántakaranum pengarnar. Tað er nevniliga ofta sera trupult hjá borgsmonnum og veðsetarum at fáa pengarnar aftur frá lántakaranum

2. Tú mást sjálv/ur meta um váðan fyri í síðsta enda at gjalda, um tú borgar ella veðsetir. Betri Banki útvegar tær nakrar upplýsingar um lántakara soleiðis, at tú kanst vera betur før/ur fyri at meta um váðan, men tú eigur at meta um, hvørt tú skalt biðja um enn fleiri upplýsingar frá lántakaranum, áðrenn tú borgar ella veðsetir.

**Hví veitir Betri Banki lán móti borgan ella triðjamansveð?**
Tá Betri Banki veitir lán og samstundis vil hava borgan ella at veð verður veitt, er tað tí, at Betri Banki ynskir meira trygd fyri afturgjaldingina av láninum, um so er, at lántakari kortini ikki megnar at rinda lánið aftur.

Ymsar orsøkir kunnu vera til, at Betri Banki ikki vil taka á seg tann váða, at lántakari ikki rindar lánið aftur. T. d. kann vera óvissa um framtíðar inntøkumøguleikarnar hjá lántakaranum, ella at hann hevur aðra skuld at dragast við. Eisini kann tað vera, at lántakarin skal læna pening til eina verkætlan ella nýtt virki, sum stórur váði er í.

# Kunning um privata borgan og triðjamansveð

**Upplýsingar um fíggjarstøðu lántakarans**
Betri Banki skal geva hesar upplýsingar um fíggjarstøðuna hjá lántakaranum:

- avrit av seinastu ársuppgerðini frá TAKS
- avrit av trimum teimum seinastu lønarseðlunum ella
- tann seinasta ársroknskapin, um borgað ella veðsett verður fyri skuld hjá einum vinnurekandi

Hevur Betri Banki ikki møguleika at fáa omanfyrinevnda tilfar til vega, skal hann geva tær annað tilfar av týdningi um fíggjarstøðuna hjá lántakaranum, ið gevur tær eitt álítandi grundarlag at meta um váðan.

Fyri at kunna fylgja við gongdini fært tú hvørt ár sent eina fráboðan um støddina á láninum ella kredittinum, ið tú hevur borgað ella veðsett fyri. Um lántakarin ikki rindar av upp á høvuðsstól, avdráttir ella rentu, fært tú boð um hetta í seinasta lagi tríggjar mánaðir eftir, at gjaldingin skuldi verið móttikin.

Aðrar upplýsingar um fíggjarstøðuna hjá lántakaranum ella endamálið við láninum mást tú sjálv/ur spyrja lántakaran um.

Spyr lántakara, um hann t. d. hevur skuld í øðrum peningastovni, ella um hann hevur aðrar serliga stórar skuldar- ella gjaldsskyldur. Spyr eisini lántakaran um, hvussu nógvan pening hann hevur eftir hvønn mánað til egna nýtslu, eftir at allar tær føstu útreiðslurnar eru goldnar.

Tá tú umhugsar váðan við at borga ella veðseta, skalt tú gáa eftir, at tær upplýsingar, sum tú fært útflýggjaðar frá Betri Banka og lántakaranum sjálvum, bert er ein støðumynd av fíggjarstøðuni hjá lántakaranum. Eftir at tú hevur borgað ella veðsett, er Betri Banki ikki hindraður í at veita lántakaranum annað lán ella annan kreditt, uttan at tú fært boð um tað. Lántakarin hevur eisini møguleika at økja um skuld sína hjá øðrum enn Betri Banka. Borganin ella veðsetingin, tú hevur veitt, fevna sjálvandi ikki um hesi nýggju lánini og kredittirnar, men økja um váðan fyri, at lántakarin ikki megnar at gjalda lánið aftur, ið tú hevur borgað ella veðsett fyri.

**Hvussu nógv kanst tú koma at gjalda aftur ?**
Sum borgsmaður kanst tú ikki koma at gjalda meira aftur enn høvuðsstólin av láninum ella á hámarkið kredittinum, tá avtalan um at borga bleiv gjørd.

Sum triðjamansveðsetari ábyrgdast tú bara við tí veðsetta lutinum, tó í mesta lagi høvuðsstólin av láninum ella hámarkið á kredittinum ella ta samlaðu skuldina, um trygdin er veitt fyri fleiri lán ella kredittir.

**Hvussu leingi er ein borgan ella veðseting galdandi ?**
Ein borgsskylda ella veðseting yvir fyri Betri Banka dettur burtur eftir 10 árum. Um avtalan er gjørd til trygd fyri ein kassakreditt við skiftandi upphædd ella fyri eitt lán uttan ásettan gjaldkomudag, dettur tín skylda burtur eftir 5 árum, uttan so, at Betri Banki longu hevur biðið teg um at gjalda.

**Ert tú vissur í, at tú vilt borga ella veita trygd ?**
Til seinast eigur tú at seta tær sjálvum spurningin: Hvat er mín meting av váðanum og mínum vánum fyri at gjalda lánið ella kredittin, um lántakarin ikki kann ella vil gjalda? Ynskir tú enn meiri ráðgeving, eigur tú at leita ráð hjá sakførara ella grannskoðara.

Borga ikki ella veit ikki veð, um tú ert í iva.

betri

**Betri Banki P/F**
Postboks 34
Yviri við Strond 2
FO-110 Tórshavn

Tel. +298 348 000
banki@betri.fo
www.betri.fo